BYGDARSKÚLIN

# Slepst ikki undan

**Møguleikin hjá kommunum at muta ímóti ætlanini at leggja teir smærru bygdaskúlarnar niður, er ikki stórur um ein skal trúgva Olaus Jespersen, deildarstjóra á fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum. - Gera kommunurnar ikki hetta sjálvboðið, verður tað landsstýriskvinnan sjálv, sum fær heimild at skipa skúlarnar í økinum, sigur hann**



SKÚLAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

"Undirvísing verður ikki í øllum verandi skúlabygningum".

Soleiðis verður tikið til í einum uppskoti, sum Helena Dam á Neystabø hevur lagt seinastu hond sína á, til tess at broyta fólkaskúlalógina og skipa landið í skúlaøki.

Endamálið við broytingunum er at útvega landsstýriskvinnuni í skúlanum heimild til at fara undir eina tilgongd at broyta skúlabygnaðin, soleiðis at skúlarnir kunnu verða skipaðir í størri skúlaeindir.

Hetta skal gerast í samstarvi við kommunurnar, men tann stóri spurningurin er, hvat kanska einamest tær smærru kommunurnar fara at siga til hetta.

Men tað er heldur ikki vist, at tað verður ein lættari avgerð at taka hjá teimum størru kommununum, sum borgarstjórin í Klaksvík, Gunvá við Keldu ger greitt aðrastaðni á síðuni.

Hon varar sjálv av einum stórum býi og fleiri smærri bygdum og bygdarskúlum, eitt nú í Mikladali og Árnafirði.

Lagt er í øllum førum upp til tjak um hetta málið, sum fyri næmingarnar og foreldur teirra fer at hava stóra ávirkan á skúlaflutningin og uttan iva eisini skúlagongdina.

### Elvan til tjak

- Verða broytingarnar samtyktar í tinginum, skulu kommunurnar áðrenn 1. januar komandi ár hava stungið út í kortið, hvussu skúlabygnaðurin skal verða í teirra øki, - ikki bara innan kommunumark, men í økinum, upplýsir Olaus Jespersen fyri Skúlablaðnum.

Ein av stóru broytingunum í uppskotinum er, tá talan er um játtanina til fólkaskúlan. Her verður tað so, at frá skúlaárinum 2011-2012 verður játtanin ikki til tann einstaka skúlan, men til skúlaøkini, sum síðan býta læraratímarnar út í skúlarnar.

Tað verða uttan iva hesar broytingarnar sum fara at elva til mest tjak:

Í fyrsta lagi tí, at úrslitið kann verða, at undirvísing ikki verður í øllum skúlum kring landið.

Í øðrum lagi verður tað neyvan lætt hjá bygdaráðum og býráðum at taka avgerð um, hvør skúli í teirra øki skal lata aftur.

### Innan verandi karmar

Eitt dømi um eina kommunu, har hetta verður aktuelt er Kunoyar kommuna.

Her eru tvær bygdir og tveir bygdaskúlar – annar í Haraldsundi við seks næm-

---



*- Tað er ikki altíð, at størri eindir og miðsavning er bíligari, staðfestir Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík*

# - Alt verður ikki bara gott

**- Tað er í fínasta slag, at bygnaðurin í fólkaskúlanum verður settur á dagsskránna. Men eg beri kortini ótta fyri avleiðingunum av at niðurleggja teir smærru skúlarnar, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík**

SKÚLAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Tað er heilt víst tørvur á bæði broytingum og dagføringum í skúlanum, slær borgarstjórin fast.

Men tað eru kortini fleiri viðurskifti í uppskotinum, sum fáa hana at óttast:

Tær rættiliga avgjørdu útsagnirnar um at alt verður so gott, um vit bara niðurleggja teir lítlu skúlarnar, tí teir eru alt ov dýrir.

- Hetta er eitt ógvuliga eintáttað sjónarmið, sigur Gunvá við Keldu sambært Skúlablaðnum.

Hon vísir á, at tað er nógv annað, sum veruliga kostar pengar, tá hugsað verður um, at landið árliga játtar meiri enn 300 mió krónur til fólkaskúlan.

### Eitt millumlið aftrat

Eitt annað sum órógvar Gunvá við Keldu er, at kommunurnar nú skulu gjalda meiri fyri minni ávirkan.

- Hetta er ongantíð eitt gott útgangsstøði í einum kjaki. Serliga tá ein hugsar um, at landsstýrið fær ógvuliga lætt spæl, um tey megna at strika greinina, sum sigur, at fólkaatkvøða skal haldast um ein skúli skal niðurleggjast. Hetta skerjir fólkaræðið, slær borgarstjórin í næststørstu kommunu okkara fast.

Royndirnar vísa, at bestu úrslitini verða nádd, tá ið ein og sami myndugleiki hevur fulla ábyrgd og heimildir á einum málsøki.

Sambært Gunvá livir hetta uppskotið altso ikki upp til henda málsetningin, og tí er vandi fyri, at fólkaskúlin framhaldandi verður eitt býtisbarn.

- Verður fólkaskúlin skipaður í øki undir landsstýrinum, heldur enn hjá kommununum, so fer tað at flyta skúlan longri burtur frá fólkaræðinum, tí fleiri millumlið koma ímillum skúlan og borgaran, sigur Gunvá við Keldu.

> *- Verður fólkaskúlin skipaður í øki undir landsstýrinum, heldur enn hjá kommununum, so fer tað at flyta skúlan longri burtur frá fólkaræðinum*